

Starvsfólkalýsing

# Skipaeftirlitsfólk

**Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki at seta skjótast gjørligt.**

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- í samstarvi við løgfrøðingin á Skipaeftirlitinum at umsita og dagføra tekniska partin av lógarverkinum innan sjóvinnuøkið við støði í altjóða sáttmálum
- málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkinum við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip.
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o.ø. feløgum ella persónum, sum eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Dentur verður lagdur á, um umsøkjarin hevur viðkomandi starvsroyndir.

Harumframt er kunnleiki til góðskustýring (kvalitetsstýring) ein fyrimunur.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2005, kl. 14.30.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið
Postmoga 26
370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355 600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

**SKIPAEFTIRLITIÐ**

Skipaeftirlitið, Miðvágur, Postrúm 26, 370 Miðvágur, Tel 355 600, Faks 355 601, fma@fma.fo, www.fma.fo

Smakkið, og siggið,
at HARRIN er góður!
Sælur er tann maður,
ið søkir sær skjól hjá Honum.
Sálmur 34,9

KVARTETTIN Vitin



Eysturoyingar!!!
Komið og syngið við!!
Leygarkvøldið 5. januar kl. 21.00,
skipar kvartettin Vitin í Betesda Klaksvík fyri sangløtu í
Ítróttarhøllini í Runavík

Á skránni er: Felagssangur - Kvartettsangur - Upplestur - Leikur - Tala
Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum afturvið

Øll eru hjartaliga vælkomin
MINST TIL! - kl. 21.00

Smakkið, og siggið,
at HARRIN er góður!
Sælur er tann maður,
ið søkir sær skjól hjá Honum.
Sálmur 34,9

KVARTETTIN Vitin



Føroyingar!!!
Komið og syngið við!!
Sunnukvøldið 6. januar kl. 20.00,
skipar kvartettin Vitin í Betesda Klaksvík fyri sangløtu í
Ítróttarhøllini á Hálsi

Á skránni er: Felagssangur - Kvartettsangur - Upplestur - Leikur - Tala
Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum afturvið

Øll eru hjartaliga vælkomin
MINST TIL! - kl. 20.00